Fylgiskjal 4

**Gudrun Mortansdóttir Nolsøe**

| | |
|---|---|
| **Fra:** | Johannes Pauli Poulsen |
| **Sendt:** | 23. januar 2019 15:21 |
| **Til:** | Gudrun Mortansdóttir Nolsøe |
| **Cc:** | Marjun Jacobsen |
| **Emne:** | SV: Broytingar í revsilógin |

Góða Guðrun

Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at ásetingarnar í § 290 a verða settar í gildi í Føroyum. Altjóða rákið klárt. Alt meira verður gjørt fyri at forða fyri hvítvasking av peningi, og eiga Føroyar ikki at standa aftanfyri sambærlig lond, hvat hesum viðvíkur. Føroyar er nú limur í Global Forum og í ár koma vit undir review. Hugt verður millum annað eftir hvítvasklóggávuni í Føroyum, og tá er gott at kunna vísa á, at revsiásetingarnar á hvítvasksøkinum eru á hædd við tær í Danmark.

Fíggjarmálaráðið hevur annars ikki viðmerkingar til uppskotið.

Vinarliga
**Johannes Pauli Poulsen**
*Fulltrúi*

Fíggjarmálaráðið/ Ministry of Finance
: direct: +298 35 20 07 / mobile: +298 55 20 07
johannes@fmr.fo

**Fra:** Gudrun Mortansdóttir Nolsøe <gudrunnolsoe@tinganes.fo>
**Sendt:** 4. januar 2019 10:16
**Til:** Johannes Pauli Poulsen <Johannes@fmr.fo>
**Emne:** Broytingar í revsilógin

Góði Johannes Pauli,

Fíggjarmálaráðið hevur fingið uppskot til broyting í Revsilógin (Brotsverk ímóti almennum myndugleikum o.a., brotsverk ímóti friði og skilhaldi, brotsverk í tænastu ella starvi hjá tí almenna o.a., følsk frágreiðing og følsk ákæra, brotsverk viðvíkjandi gjaldsmiðlum og skjalafalsan) til ummælis, sí eisini viðheft. Í uppskotinum er ein nýggj § 290 a, sum viðvíkur hvítvask, sett inn.
Kann Fíggjarmálaráðið hyggja eftir hesi broyting, og viðmerkja um broytingin er neyðug í Føroyum, og stutt siga nakað um, hvørjar avleiðingarnar eru, um broytingin ikki verður gjørd í Føroyum.

Vinarliga

Gudrun